## Vit vinna skjótt gull

Michael Johnson, miðvallarin hjá Manchester City, væntar, at liðið skjótt fer at vinna ensku Premier League. – Sjálvsagt er tað realistiskt. Vit hugsa fyrst og fremst um at liggja so væl fyri sum gjørligt, men tá alt kemur til alt, vilja vit helst vinna landskappingina, sigur 21 ára gamli Michael Johnson við enskar miðlar. Manchester City hevur ikki vunnið eitt gullheiðursmerki, síðan felagið vann Liga Cuppina í 1976.



## Spania vann bronsuna

Suðurafrika var um at vinna bronsuna í Confederations Cup-kappingini í gjár. Evropeisku meistararnir úr Spania tryggjaði sær tó sigurin í tíðini longdu leiktíðini. Elrio van Heerden legði Suðurafrika á odda miðskeiðis í seinna hálvleiki, men tá tríggir minuttir restaðu í, javnaði innskifti Daniel Guiza fyri Spania. Minuttin seinni legði sami Guiza sítt lið á odda, men í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat var Mphela á blettinum fyri Suðurafrika. Men í longdu leiktíðini tryggjaði Xabi Alonso sigurin fyri Spania, tá hann skoraði til endaliga úrslitið 3-2.

# nir nakrantíð



Per Holm Andersen, sum hesa ferð við sum liðleiðari hjá føroyska liðnum í bogaskjóting, verður ofta roknaður sum ein av føroysku humørbumbunum



Veðrið er av tí allarbesta, nú Oyggjaleikir eru á Álandi



Allir smálutir skulu sjálvandi fáast í rættlag. Her eru ÍSF-forsetin í ferð við onkra fyrireiking undir setanini



Aksel H. Poulsen og Durita Sigmarsdóttir Davidsen bóru ávíkavist Merkið og føroyska vatnið inn til setanina